# Schengen byrjar í mars

**25. mars fara Føroyar saman við hinum norðurlondunum uppí Schengen-samstarvið. Skipanin sjálv smakkar illa í munninum á Høgna Hoydal, sum kortini mælir løgtinginum til at samtykkja, at Føroyar fara uppí samstarvið**

SCHENGEN-SAMSTARV
*Magnus Dam*



*Frá 25. mars verður óneyðugt at hava passið við tá tú ferðast í ES-londum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað verður lættari at ferðast til ES-lond, um løgtingið samtykkir tvey ríkislógartilmæli, sum landsstýrismaðurin í lógarmálum legði fyri løgtingið týsdagin. Høgni Hoydal heitir á løgtingið um at samtykkja ein part av Schengen-sáttmálanum og ávísar broytingar í útlendingalógini, sum eru ein fyritreyt fyri føroyskari luttøku í samstarvinum.

Tann »innari marknaðurin« hjá ES krevur frían flutning av kapitali, vørum, tænastuveitingum og persónum – og tað er tann fríi persónsflutningurin, sum Schengen-samstarvið skal tryggja.

## Broyta útlendingalógina

Schengen-skipanin er ein skipan millum tey 15 ES-londini, sum ber í sær, at fólk kunnu ferðast frítt millum øll ES-londini uttan at vísa pass ella visa. Norra og Ísland hava knýtt seg uppí skipanina, og øll norðurlondini hava gjørt av at fara uppí skipanina í felag tann 25. mars næsta ár. Hetta tryggjar, at norðurlendska passfrælsið kann halda fram óbroytt eftir hendan dag.

Danmark hevur tryggjað sær, at Føroyar og Grønland eisini sleppa at knýta seg uppí skipanina, men vit skulu lúka ávís krøv áðrenn.

Eitt nú er neyðugt, at løgtingið broytir útlendingalógina, tí lóggávan í Føroyum skal vera á leið tann sama sum í Danmark.

Avtalan setir eisini strangari krøv til eftirlitið við mørkini í Føroyum og Grønlandi, tí efirlitið við, hvør kemur til eitt Schengen-land úr einum ikki-Schengen-landið skal vera strangt. Ein Schengen-nevnd hevur staðfest at eftirlitið í Føroyum er nóg gott sum er.

## Smakkar illa

Tað er júst hetta økta eftirlitið, sum smakkar illa í munninum á uppskotsstillaranum sjálvum. Høgni Hoydal heldur, at Schengen-samstarvið er ein eksklusivur klubbi, sum hevur til endamáls at halda fólkinum í fátæku londunum í Afrika og aðrastaðni uttanfyri ringin, sum Schengen-samstarvið leggur um Evropa.

Tey, sum eru innanfyri, skulu verja seg móti teimum, sum eru uttanfyri, sigur landsstýrismaðurin.

- Í veruleikanum kann hendan stórpolitiska verkætlan tulkast sera kalt og kyniskt: Ríka Evropa skal verja seg móti fátæka Afrika og Asia – har fólk hava hug at koma til ríkidømið, sum Evropa hevur – eitt ríkidømið, sum í stóran mun er bygt á virðir úr fyrrverandi hjálondunum í Afrika og Asia.

Høgni Hoydal heldur, at stórpolitiska endamálið við Schengen-skipanini er sera ivasamt og einki hugaligt.

Men hóast hesar viðmerkingarnar, so vil Landsstýrismaðurin ikki mæla løgtinginum frá at fara uppí skipanina, og tað eru eisini fyrimunir og góð endamál við Schengen-samstarvinum. Tað er ein sannroynd, at neyðugt er við samstarvi millum londini í Evropa um at byrgja fyri brotsverkum, sum fara um landamørk í dag, vísir landsstýrismaðurin á.

– Fyri Føroyar er ikki nógv í at velja. Annaðhvørt verða vit knýtt uppí skipanina, ella kunnu vit standa uttanfyri »ringin« og skulu so gjøgnum strangt eftirlit til tess at sleppa innum, vísir hann á.

## Felags skráseting

Tað verður løgreglan í Føroyum, sum kemur at taka sær av stranga eftirlitinum, sum Schengen-samstarvið krevur. Løgreglan skal tryggja, at persónar, sum koma frá londum uttanfyri Schengen, verða kannaðir væl. Og løgreglan skal eisini taka sær av tí partinum, sum snýr seg um eina felags skráseting millum øll Schengen-londini.

Talan er um eina telduskipan, sum skrásetur brotsverk og brotsfólk í øllum Schengen-londunum. Løgreglurnar í øllum londunum hava atgongd til hesa skipanina, og tær hava eisini skyldu at skráseta og lata víðari upplýsingar um revsiverd viðurskifti.

Schengen-sáttmálin merkir eisini, at løgreglurnar í einstøku londunum hava loyvi til at steðga og kanna persónar inni í landinum og biða um samleikaprógv og prógv fyri uppihaldsloyvi. So har passið nú skal vísast við markið, skal tað eftir 25. mars vísast mitt á gøtuni, um løgreglan krevur tað.

Ein onnur broyting við Schengen-samstarvinum er, at løgreglur í øðrum londum fáa ávísar heimildir til at jagstra brotsmenn inni í hinum limalondunum.

Av tí at tíðarfreistin er stutt, til norðurlondini fara uppí samstarvið, hevur løgmálaráðið heitt á ríkisumboðið um at leggja málið fyri landsstýrið skjótast gjørligt, so tað kann verða avgreitt í góðari tíð.

# Tyrlutænastan samtykt

**Ein meiriluti í løgtinginum gav týsdagin Jørgen Niclasen heimild til at gera ein tíggju ára sáttmála um veitan av tyrlutænastu**

TYRLUTÆNASTA
*Magnus Dam*

Eftir at vinnunevndin hevði skrivað tvey álit, og løgtingið hevði havt enn eina drúgva viðgerð av málinum, eydnaðist tað týsdagin einum meiriluta at samtykkja uppskotið um tyrlutænastuna, sum so nógv orðaskifti hevur verið um seinastu dagarnar.

Atlantic Airways varð strikað úr sjálvum lógartekstinum, og nú gleið uppskotið betur niður hjá einum parti av løgtinginum. 17 tingmenn atkvøddu fyri uppskotinum við aðru viðgerð, meðan tey 13 umboðini hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum atkvøddu blankt.

Í lógartekstinum stendur nú, at landsstýrismanninum verður heimilað at gera ein 10 ára sáttmála um veitan av tyrlutænastu. Har stendur sostatt einki um Atlantic Airways, og hetta merkir, at landsstýrismaðurin í veruleikanum kann gera sáttmála við eitthvørt felag um tyrlutænastuna. Men einki bendir á, at Jørgen Niclasen fer at lata einum øðrum felag tíggju ára sáttmálan, sum hevur eitt virði uppá 140 milliónir krónur yvir næstu 10 árini.

Andstøðan segði seg ikki kunnað taka undir við uppskotinum, tí hon heldur, at málið framvegis er ov illa lýst, og at Jørgen Niclasen ikki hevur greitt løgtinginum frá, um talan veruliga er um bestu og bíligastu loysnina.

Men 17 tingmenn hildu altso, at málið er búgvið at fara víðari til triðju og endaligu viðgerðina, og soleiðis broytt varð uppskotið samtykt.

# Andstøðuuppskot góða móttøku

**Uppskotið hjá Hans Paula Strøm um at taka av 120-daga regluna fekk góða móttøku við fyrstu viðgerð í løgtinginum týsdagin**

120-DAGA REGLAN
*Magnus Dam*

Tað kemur fyri, at andstøðuflokkarnir í løgtinginum koma við einum uppskotið, sum samgongan ikki kveistrar av borðinum. Eftir ein heldur úrslitaleysan mánadag, har øll andstøðuuppskotini um broytingar í fíggjarlógini vórðu feld, hevði Javnaðarflokkurin størri hepni við einum uppskotið um at broya starvsfólkalógina.

Hans Pauli Strøm vil hava landsstýrið at broyta lógina, so tann sokallaða 120-daga reglan verður strikað úr starvsfólkalógini. 120-daga reglan sigur, at eitt alment arbeiðspláss kann siga einum starvsfólki úr starvi, um viðkomandi hevur verið sjúkur í meira enn 120 dagar í einum tíðarskeiði upp á eitt ár. Uppsagnartíðin kann sambært lógini verða ein mánaði, meðan uppsagnartíðin í øðrum førum er millum 6 mánaðir og eitt ár.

## Fyribyrgja uppsøgn

Javnaðartingmaðurin heldur, at tað almenna í staðin fyri at hava eina reglu um uppsøgn eftir 120 dagar sjúkrafráveru skal hava ein meira aktivan leiklut í at varðveita ella fáa starvsfólkini inn aftur á arbeiðsmarknaðin. Er eingin annar útvegur enn at siga starvsfólkinum upp, so skal uppsagnartíðin leingjast, so hon í øllum førum er millum 6 mánaðir og eitt ár.

Og hesum taka flestu flokkarnir í løgtinginum undir við, vísti viðgerðin í løgtinginum týsdagin. Framsøgumenninir hjá bæði samgonguflokkum og andstøðuflokkum søgdu seg taka undir við uppskotinum. Finnur Helmsdal úr Tjóðveldisflokkinum helt, at talan var um eitt gott uppskot, sum broytir starvsfólkalógina, so hon samsvarar við aðra lóggávu á almannaøkinium, har roynt verður at geva teimum sjúku ein møguleika afturat á arbeiðsmarknaðinum.

Hóast framsøðumaðurin hjá Fólkaflokkinum, Jógvan á Lakjuni, er samdur í, at tað er óheppið at siga fólki upp, tí tey gerast sjúk, so hevði hann kortini ávís fyrivarni. Hann vildi ikki siga, um flokkurin tekur undir við uppskotinum ella ikki, tí fyrst vil hann hava greiði á, hvussu ofta 120-reglan verður nýtt á arbeiðsmarknaðinum, og um lógarbroytingin veruliga bøtir um støðuna hjá starvsfólkum. Men hann lovaði eins og aðrir tingmenn at geva uppskotinum eina gjølliga viðgerð.

## Fylgja rákinum

Sambært Hans Paula Strøm fylgja Føroyar rákinum í øðrum londum, um vit í staðin fyri at siga fólki upp vegna sjúku, royna at fyribyrgja, at fólk nakrantíð leggjast heima í so langa tíð vegna sjúku. Hans Pauli Strøm skjýtur upp, at almennu arbeiðsplássini fáa eitt sjúkraráð, sum hevur til endamáls at røkja áhugamálini hjá sjúku starvsfólkunum. Ráðið skal royna at finna arbeiðsuppgávur ella skipa arbeiðstíðina, so hon verður lagað til heilsubrekið hjá sjúka starvsfólkinum.

Hans Pauli Strøm heldur ikki, at tað krevur ov nógv av arbeiðsplássunum at skipa eitt tílíkt sjúkraráð, tí ráðið kemur bert saman, tá eitt starvsfólk verður sjúkrameldað í longri tíð, og tað er ikki so ofta.

Vinnunevndin hjá løgtinginum skal nú viðgera uppskotið hjá Hans Paula Strøm.



# Aria heilsar Lognbrá



*Aria verður helst seinasti tónleikabólkurin, sum fer at spæla í dansistaðnum Lognbrá í Klaksvík*

**Fríggjakvøldið spælir poppbólkurin Aria í Lognbrá, sum skal lata aftur um stutta tíð**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Av tí at talan er um, at kenda dansistaðið í Klaksvík Lognbrá skal lata aftur á nýggjárinum, hevur bólkurin Aria sagt ja til at spæla har fyri seinastu ferð.

Lognbrá er eitt av teimum fáa dansistøðunum, sum eru eftir í landinum, ið hýsir ungdómi undir 18 ár. Hetta er tí, at Lognbrá ikki byggir sín dans á skeinkiloyvi, sum annars vanligt í dag – eitt nú í høvuðsstaðnum.

Livandi tónleikur hevur verið fastur táttur í Lognbrá øll árini. Bólkar úr øllum landinum hava verið í Klaksvík og spælt, tí Lognbrá hevur verið eitt gott stað fyri føroyskar bólkar. Hølini eru ikki ov stór, sum ítrottarhallir ofta kunnu tykjast, og hinvegin er tað heldur ikki ov trongligt.

Ein av bólkunum sum hevur góð minni frá Lognbrá, er Aria, sum líkasum hevur havt Lognbrá sum sín skansa í heimstaðnum. Tí hildu teir í Aria tað vera upplagt at heilsa Lognbrá eina seinastu ferð við at trína á pallin.

Orsøkin til at Lognbrá nú gevst við dansi er, at hølini eru partur av KÍ-høllini, og KÍ, sum eigur høllina, hevur brúk fyri hølunum, har Lognbrá hevur hildið til.

# Smyril Line roynir at hækka partapeningin

**Landsstýrið hevur fingið áheitan frá Smyril Line um at seta 25 milliónir krónur í felagið sum partapening**

SMYRIL LINE
*Eyðun Klakstein*

Landsstýrismaðurin í vinnumálum umhugsar nú, hvat hann skal svara eini áheitan frá Smyril Line um at seta meira partapening í felagið.

Smyril Line arbeiðir nú við at hækka partapeningin í felagnum, og skal landsstýrið varðveita sín prosentpart, skal tað seta 25 milliónir afturat í felagið.

Smyril Line hevur víst á, at útlendskur áhugi er fyri at seta pengar í felagið, so um landsstýrið ikki vil verða við til at hækka partapeningin, er vandi fyri, at Smyril Line fer á útlendskar hendur.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, ætlar sær at viðgera áheitanina frá Smyril Line væl og virðiliga, áðrenn hann svarar.

Fyri hann hevur tað ikki størst týdning, um Smyril Line kann fara á útlendskar hendur, men um ein íløga í felagið kann loysa seg.

## Ein kjans afturat

Tað eru nú tvær vikur síðani, at tað kom fram, at Smyril Line hevði trupulleikar við at halda gjaldstreytirnar í byggisáttmálunum um nýggju Norrønu.

Skipasmiðjan í Flensburg kravdi upp á stutt skoðbrá størri trygd frá Smyril Line, um byggingin skuldi halda fram, men hesa trygd kundi Smyril Line ikki veita. Millum annað tí at landsstýrið seg nei til at veðhald fyri einum láni upp á 30 milliónir krónur.

Nú hevur Smyril Line fingið ein møguleika afturat frá skipasmiðjuni at styrkja seg fíggjarliga, og arbeitt verður nú við at hækka partapeningin við meira enn 100 milliónum krónum.

# Neyðugt við stórum avlopi á fíggjarlógini

**Búskaparráðið heldur tað verða neyðugt við varnum fíggjarpolitikki, til føroyingar vita meira um komandi oljuvinnu og burturbeiningina av ríkisstuðlinum**

BÚSKAPUR
*Eyðun Klakstein*

Landsstýrið skal føra ein varnan fíggjarpolitikk, sum kann tryggja eitt stórt avlop á fíggjarlógini eina tíð afturat.

Hetta mælir Búskaparráðið til í nýggjstu frágreiðing síni, sum kom í síðstu viku.

– Til vit vita meira um, hvussu verður við inntøkunum í landinum framyvir – til dømis við eini møguligari oljuvinnu og burturbeiningini av ríkisstuðlinum – er neyðugt at vera varin á fíggjarpolitiska økinum. Tí er neyðugt við stórum avlopi á fíggjarlógini eina tíð afturat, sigur Búskaparráðið.

Búskaparráðið sigur seg bert kunnu viðmæla skattalætta, um útreiðslustøðið hjá landskassanum verður lækkað samstundis og samsvarandi.

## Órógva sum minst

Búskaparráðið sigur, at inntøkurnar hjá landskassanum skulu krevjast inn, so búskapurin verður órógvaður sum minst av hesum.

– Skattir og avgjøld skulu ásetast út frá langtsiktaðu ætlanum fyri útreiðslustøðið hjá tí almenna. Inntøkur og útreiðslur skulu javnviga í miðal yvir tíð og eiga ikki at broytast út frá búskaparligum stutttíðarbroytinum, tí broytingar í sær sjálvum hava við sær samfelagsbúskaparligar kostnaðir, sigur Búskaparráðið.

Ráðið sigur, at hetta er í sær sjálvum ikki nøkur løtt uppgáva, tí bert tað at vita, nær tíðirnar eru góðar og ringar, er sera trupult.

## Hall á handilsjavnanum

Fyrstu sjey mánaðirnar í ár øktist innflutningurin við einum fjórðingi samanborið við sama tíðarskeið í gjør og er nú komin upp um tríggjar milliardir.

Sama tíðarskeið í ár vaks útflutningsvirði 17% sammett við í fjør.

Økingin í innflutninginum stendst serliga av øktum innflutningi av skipum og maskinum, meðan innflutningurin til húsarhaldini ikki er øktur so nógv – umleið 12%.

Innflutningsvirðið á bilum er umleið á sama støði sum í fjør, hóast talið av innfluttum bilum er minkað 17%.

Gongdin í út- og innflutninginum hevur havt við sær, at handilsjavnin nú vísir hall upp á 31 milliónir krónu fyrstu sjey mánaðirnar í ár.


Jól í Miðbýnum 2000

Í jólavikuni hava vit opið soleiðis

Mikudagur 20 . desember til kl. 20.00
Hósdagur 21. desember til kl. 20.00
Fríggjadagur 22. desember til kl. 20.00
Leygardagin 23. desember til kl. 22.00

Jólaaftan er stongt.

Hjá Frants Restorff er opið jólaaftan til kl. 13.00

20. des. kl. 17.00 Rútmiska kórið í Hoydølum syngur í gongugøtuni.
kl. 19.00 Cantabile syngur í gongugøtuni.

21. des. kl. 15.00 Jólamenninir koma ríðandi oman á Kongabrúnna.
kl. 16.00 Tórshavnar Ungdóms-Hornorkestur spælir.
kl. 18.00 GHM spælir í gongugøtuni.

22.des. kl. 16.00 Tórshavnar Ungdóms-Hornorkestur spælir .
kl. 18.00 Frelsunar Herurin spælir í gongugøtuni.

23.des. kl. 17.00 Sangur úr Evangelihúsinum.
kl. 19.00 Havnar Hornorkestur spælir í býnum.

Jólamenninir verða í býnum hvønn seinnapart til jólaaftan

